Íslendsk lesandi á vitjan:

# Vilja menna samstarvið



*Íslendsk lesandi eru á hesum døgum á vitjan í Føroyum. Tey vitja kring oyggjarnar og tá tey koma aftur til Íslands skulu tey skriva uppgávu og gera framløgur um ferðina*

**Í hesum døgum vitja 12 lesandi úr Íslandi í Føroyum. Tey ganga øll á lærda háskúlanum, har tey lesa fólkalívsfrøði, geografi ella ferðavinnu. Við vitjanini vilja tey byggja upp at slag av sambandi millum Føroyar og Ísland**

VITJAN
*Ingrid Bjarnastein*

**Klaksvík:** Í góðveðrinum mikudagin hitti Sosialurin nakrar íslendingar, sum í hesum døgum eru í Føroyum í sambandi við uppgávur, sum teir skulu gera á lærda háskúlanum í Íslandi.

Eitt av meginmálunum við ferðini er at menna samstarvið landanna millum, og eisini millum teir báðar lærdu háskúlarnar í Føroyum og Íslandi.

### Vitja runt

Teir lesandi íslendingarnir komu til Føroya mánadagin. Har tók Jógvan Mørkøre frá Fróðskaparsetri Føroya ímóti teimum, og tey vóru allan dagin í Havn, áðrenn leiðin um kvøldið gekk til Klaksvíkar. Í Klaksvík vóru tey so til mikukvøldið, tá tey fóru aftur til Havnar.

– Vit gera uppgávur um ymiskt. Her eru fýra bólkar, sum hava hvør sítt evni. Tey arbeiða ávíkavist við Ferðavinnu, tónleiki, fjarlestri og málningalist, greiðir Gunnar Þór Jóhannesson, sum er leiðari fyri ferðini.

Bólkurin, sum fæst við ferðavinnu, hevur ímeðan tey hava verið her norðuri verið á Viðareiði og spurt um ferðavinnu har. Eisini hava tey ætlanir um at fara til Nólsoyar.

– Bara við at gera ein túr á henda hátt, so skapar tú samband millum bæði londini, og tað hevur meira at siga fyri okkum enn sjálvar verkætlanirnar vit arbeiða við. Tað er orsøkin til, at vit eru komin higar. Ògvuliga lítið samband hevur verið landanna millum, og hetta ætla vit at bøta um, sigur Gunnar.

Tá vit fangaðu tey, vóru tey á Granskingardeplinum í Klaksvík. Har skuldu tey tosa við Gest Hovgaard og Ólavur W. Høgnesen um fjarlestur og útjaðaramenning

Hvør bólkur skal, tá komið er aftur itl Íslands, gera eina lítla uppgávu um evnið tey hava valt, og síðani skulu tey eisini hava eina lítla framløgu.

### Tónleikur

Ein av bólkunum ger uppgávu um føroyskan tónleik. Í Íslandi hevur seinastu tíðina verið ein, sum íslendingar kalla tað, føroysk alda av tónleiki.

– Vit kanna fyribrygdið, sum føroyskur tónleikur er, og vit tosa við fólk, sum antin spæla, útgeva ella skriva um tónleik, greiða tveir í tónleikabólkinum frá.

– Føroyskur tónleikur er ógvuliga væl umtóktur í Íslandi. Tað byrjaði við Týr, so Eivør og Clickhaze, og tað hevur hildið áfram soleiðis. Vit hava lurtað eftir tónleikinum og roynt at funnið útav, hví íslendingum dámar so væl føroyskan tónleikin.

Teir hava eisini roynt at seta tónleikin saman við føroyska samfelagið og føroyskar siðir, og hugt eftir, hvat er nýt tog hvat er gamalt.

– Tað kom óvart á okkum, hvussu nógv fólk í Føroyum fáast við tónleik og útgávur. Eisini er merkistvert, hvussu fjølrboyttur tónleikurin er, og hvussu høgt fólk ganga uppí tað. Vit eru faktiskt øvundsjúkir, siga teir báðir og flenna.

Teir leggja afturat, at í føroyska tónleikaheiminum hendir nógv meira samanborið við tann íslendska.

– Føroyskir bólkar og tónleikarar eru á ógvuliga høgum støði.

Á ferðini her í Føroyum hava teir higartil hitt Eyðun Klakstein, sum skrivar um tónleik, og eisini høvdu teir avtalur við Kristian Blak, Hans Egholm og Sólarn Solmunde. Og leygardagin skal tónleikabólkurin til hálvfinaluna í Prix Føroyum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og tað gleða tey seg nógv til.

– Vit hildu, at mars mánaður fór at vera so at siga deyður her, men vit mistóku okkum. So tað verður spennandi at síggja leygardagin, tí vit hava onga slíka kapping í Íslandi. Har er bara ein fyri ungar tónleikabólkar, verður greitt frá.

Túrurin til Føroya er stuðlaður av íslendksa mentamálaráðnum, Fitur og lærda háskúlanum í Íslandi.

– Vit hava fingið stórt gestablídni bæði frá Granskingardeplinum og Fróðskaparsetri Føroya, sigur Gunnar Þór Jóhannesson, ferðaleiðari.

Hetta er fyrsta ferðin av hesum slagi, sum er gjørd til Føroya. Ein líknandi ferð er gjørd til Grønlands fyrr. Lærdi háskúlin í Íslandi telur millum 7 og 8000 lesandi, og har er tað møguligt at lesa næstan allar grundlærugreinar á universistetsstøði.

# Tríggir bólkar á Margarinfabrikkini

**Tríggir bólkar fara fríggjakvøldið at hava konsert á Margarinfabrikkini. Tveir av teimum hava luttikið á Prix Føroyum í ár**

KONSERT
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjakvøldið verður ein spennandi konsert í Ungdómshúsinum Margarinfabrikkin í Havn.

Tríggir bólkar skulu spæla, og teir hava allir ein serligan stíl. Tveir av bólkunum hava luttikið til Prix Føroyar kappingina í ár.

Talan er um bólkarnar Páll Finnur Páll, John John, sum itu onkikanndiskuterast.altkann til Prix Føroyar og The Hills.

The Hills er ein ikki heilt ókendur bólkur, tí allir limirnir koma úr bólkinum Krit, sum eisini hevur luttikið í Prix Føroyum. Tó ikki sangarin.

Margarinfabrikkin er eitt virkishús, har børn og ung kunnu vera í rúsfríum umhvørvi. Javnan verður skipað fyri livandi tónleiki og barnadiskotek er annað hvør vikuskifti.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Oddvá Nattestad 55 ár

Í dag, 14. mars, fyllir Oddvá Nattestad í Havn 55 ár. Hon er fødd í Syðrugøtu, dóttir Honnu og Leon Joensen.

Oddvá tók læraraprógv í Havn í 1976. Hon hevur síðani havt fleiri lærarastørv í Havn, men hevur ikki verið lærari alla tíðina. Hon hevur eisini havt tætt tilknýti til Sjónleikarhúsið og eitt skifti eisini við Útvarpið.

Oddvá er gift við Niels Nattestad.



## Christian Mejdahl nýggjur fólkatingsformaður

Formaðurin í tingbólkinum hjá Vinstra verður nýggjur formaður í Fólkatinginum.

Í gjár varð greitt, at formaðurin í fólkatingsbólkinum hjá Vinstra, Christian Mejdahl, skal taka við formansstarvinum í Fólkatinginum eftir Ivar Hansen, sum brádliga doyði mikunáttina.

Síðani Ivar Hansen doyði, hevur verið tosað um, hvør skuldi taka við eftir hann. Andstøðuflokkarnir gjørdu rættiliga skjótt greitt, at teir fóru ikki at leggja nakað uppskot fram, tí tað var hildið rætt, at meirilutin í tinginum átti formansstarvið. Christian Mejdahl var longu tíðliga frammi sum eitt møguligt evni. Mikudagin fekk hann so tilboðið, og í gjár boðaði hann frá, at hann tók av. Frammanundan høvdu allir andstøðuflokkarnir boðað frá, at teir fóru at stuðla honum, tá sjálvt valið verður mánadagin.

Christian Mejdahl er royndur politikari. Hann ger ikki nógv hóvasták burtur úr sær sjálvum og heldur seg vanliga burtur frá fjølmiðlunum. Hann hevur fyrr fingið tilboð um ráðharrasess, men tók ikki av.

Nú hann verður fólkatingsformaður, skal tingbólkurin hjá Vinstra hava nýggjan formann. Hildið verður fyri vist, at tað verður annaðhvørt Jens Vibjerg ella Rikke Hvilshøj.



*Mánadagin verður Christian Mejdahl formliga valdur til fólkatingsformann*

**Árni Joensen**

## Rætting

Í mikudagsblaðnum skriva vit, at Snorri Fjallsbak undirvísir í studentaskúlanum. Men hann er ikki longur lærari í Hoydølum. Sum vit skrivaðu í oktober ella november 2001 arbeiðir hann í Fíggjarmálaráðnum á Lønardeildini. Byrjaði har tann 1. november 2001.

Umberi mistakið.

**Blstj.**

## Vit vóru ov tíðliga á á veg

Í blaðnum í gjár varð skrivað, at Bárður Jákupsson fylti 60 ár á grækarismessu.

Vit vóru í so tíðliga á veg við innsendu heilsanini til Bárð. Hann fyllir ikki runt á grækarismessu, men seinni í ár.

Vit biðja Bárð orsaka mistakið.

**Blstj.**



## Hendrik Andreasen 25 ára starvsdag

1. februar hevði Hendrik Andreasen 25 ára starvsdag hjá P/F Leif Mohr og P/F LM Electric í Havn. Hendrik er føddur og uppvaksin í Haldarsvík. Hann lærdi til elektrikara á Tórshavnar Skipasmiðju frá 1972-76. Frá 1976-78 var hann á installatørskúla í Odense. 1. februar 1978 bleiv hann settur í starv sum elektrikari hjá P/F Leif Mohr. Seinnu árini hevur Hendrik arbeitt á teknistovuni við projektering og ráðgeving.

**mg**

## Gilli Wardum til Landsbankan

1. mars bleiv Gilli Wardum búskaparfrøðingur settur í starv hjá Landsbanka Føroya. Gilli, sum er úr Hoyvík, er útbúgvin cand.polit og arbeiddi í 3 ár sum búskaparfrøðingur á eini danskari ráðgevingarfyritøku, áðrenn hann kom heim aftur til Føroya.

**mg**



## Havnar Arbeiðskvinnufelag ársaðalfund

22. februar hevði Havnar Arbeiðskvinnufelag ársaðalfund, har 125 limir vóru á fundi. Í nevndina vórðu valdar Anni Benjaminsen og Anne Lisa Davidsen. Sum tiltakslimir vórðu valdar Ethel Christiansen og Helma Poulsen. Í nevndini eru: Vígdis Johannesen formaður, Oda Dalfoss næstformaður, Anni Benjaminsen skrivari og Anne Lisa Davidsen og Nina Dahl nevndarlimir. Vígdis Johannesen hevur verið formaður felagnum síðan fyrst í 90-unum.



*Vígdis Johannesen formaður*

## Navnið á degnum í dag

14. mars: Euthycius, deyður umleið 740. Tikin av døgum í Mesopotamiu.


# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:..............................................................
Bústaður:..............................................................
Bygd/býur:..............................................Tel:...............................
Evt. arbeiðspláss:..............................................................

Merkisdagurin er: ..............................................................

Innsendari: ..............................................Tel:...............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo